Tú veitst, hvat tú fært

Á Fólkating fyri Føroyar

Góðu føroyingar.

Longu í 2011 gjørdu vit av, at hesar skulu vera okkara grundreglur í arbeiðinum á Fólkatingi:

- Sessurin skal røkjast fulla tíð.
- Vit heingja ikki føroyskar ósemjur út á snór í Danmark.
- Vit virða føroyska fólkaræðið og arbeiða ikki ímóti eini føroyskari stjórn.
- Málið er at skapa ítøkilig úrslit.
- Vit samstarva við øll, sum vit kunnu fáa úrslit saman við.
- Umboðanin kann vera hvøss, men skal vera semjusøkjandi.

Við hesum útgangsstøði hava vit røkt sessin og fingið nógv og góð úrslit fyri Føroyar.

Vinna vit álitið aftur, heldur arbeiðið fram á júst sama hátt.

Vinaliga,
Aksel V. Johannesen,
floksformaður

Nýggj vitan

Ein partur av okkara arbeiði er at gera fakligar dygdargóðar frágreiðingar, sum ger tað lætt hjá fólki at skilja fløkt mál.

Hetta valskeiðið hevur tað snúð seg um Føroyar og handilsfelagsskapin WTO, um samstarvið við Russland, um útlendingamál og um hvussu ríkisfelagsskapurin kann endurnýggjast.

Tilfarið er brúkt av politisku skipanini, av fjølmiðlum og í skúlum.

Tiltøk og ráðstevnur

Armenia

Vit skipaðu saman við øðrum fyri heili seks tiltøkum í Føroyum og eini stórari ráðstevnu á Christiansborg um teir burturriknu kristnu armenarnar í Nagorno-Karabakh.

Vit hava sett hetta týdningarmikla, men gloymda evni á skrá í politisku skipanini og í miðlunum, bæði í Føroyum og Danmark.

Ukraina

Vit hava havt ukrainska sendiharran á vitjan í Føroyum, her hann hitti myndugleikar, vinnulív og ukrainskar flóttar.

Vit hava stuðlað føroysku hermonnunum í Ukraina, og á annan hátt stuðlað ukrainska frælsisbardaganum.

Russland

Í sambandi við frágreiðingina um fiskivinnusamstarvið við Russland høvdu vit framløgur og kjak fyri fullsettari Løkshøll.

Útlendingar

Við støði í frágreiðingini um evnið skipaðu vit fyri ráðstevnu um útlendingamál. Vit tóku eisini politisk stig, sum førdu til beinleiðis ábøtur. Til dømis er viðgerðartíðin hjá føroyingum sum søkja um ríkisborgaraskap stytt munandi, eins til umsóknartilfar nú er tøkt á føroyskum.

Vit høvdu høvdu eisini tveir danskar politikarar á vitjan, sum á tveimum vælvitjaðum fundum tosaðu um avbjóðingarnar, sum Danmark hevur fingið av nógvari tilflyting, og hvat Føroyar kunnu læra av tí.

Óli Jákup Jacobsen

Óli Jákup er 38 ára gamal, giftur við Gunnvá, og eiga tey børnini Kirstin (10 ár), Heiðrun (7 ár), Bjørt (5 ár) og Robert (3 ár). Óli Jákup hevur búskaparliga bakgrund og hevur starvast sum grannskoðari, á Gjaldstovuni og nú á Glasi. Honum dámar væl at brúka tíð upp á børnini, bøkur, borðspøl og bólt – serliga hondbólt, har hann er nevndarlimur í Neistanum og hevur verið U3-venjari í felagnum í eini 6-7 ár. Óla Jákupi dámar sera væl at ferðast sum familja – bæði heima og úti í heimi.

Heini Kristiansen

Heini er 40 ára gamal, giftur við Súsannu, og tey eiga børnini Miriam, Markus og Eyðgerð. Hann er starvsfólkaleiðari hjá Bakkafrosti, útbúgvin cand.merc. og hevur sitið eina setu í býráðnum í Nes Kommunu. Heini er virkin deknur og sunnudagsskúlalærari og hjálpir til í frítíðaráhugamálunum hjá børnunum. Tá ið Heini skal gera okkurt fyri seg sjálvan, dámar honum best at spæla innandura fótbólt ella onkran dyst við 3. deild hjá B68 ella 2. deild hjá Tjaldur.

Kim Durhuus

Kim er 58 ára gamal og giftur við Anniku. Tey eiga børnini Bárð, Guðruna og Mattias. Hann er útbúgvin í sølubúskapi, og hevur seinastu 25 árini verið sjálvstøðugur vinnurekandi. Hann rekur KD Seafood, sum keypir og selir laks á altjóða marknaðinum. Hetta hevur givið honum breiðar royndir innan altjóða samstarv. Hann hevur verið virkin í kommunalpolitikki í knapt 14 ár, harav knapt 6 ár sum bygdaráðsformaður/borgarstjóri. Seinasta valskeið hevur hann eisini verið tingmaður. Uttan fyri arbeiðið og politikkin leggur hann stóran dent á samveru við familju og vinir. Hann telvar við talvfelagnum Róki og fylgir væl við í hondbólti og øðrum ítrótti. Løturnar saman við abbasynunum hava eisini ein heilt serligan týdning.

Signhild V. Johannesen

Signhild er 58 ár og í parlagi við Jens Paula Sólstein. Hon eigur 4 børn og 6 ommubørn. Hon hevur verið býráðslimur í Klaksvík síðani 2012. Hon er m.a. forkvinna í stýrinum fyri Varpið. Í 35 ár hevur hon verið á Posta, seinastu 15 árini sum økisleiðari. Signhild dámar væl at røra seg. Hon hevur gingið øll fjøllini í Føroyum, runnið hálvt marathon og gongur til styrkivenjing og saunagos. Børn og barnabørn eru á skránni hvørja viku. Eftir lokna arbeiðsviku dámar henni væl heimahugna við samveru og góðum mati. Hon elskar føroysku náttúruna, serliga várið, tá tað sprettir og angar av gróðri, og tey stjørnukláru heystarkvøldini við málageipan og rokan í kjallara og dampi í vindeygum frá nýkókaðari blóðpylsu.

Valevni

Ólavur Larsen

Ólavur er 42 ára gamal og býr í Fuglafirði saman við unnustuni Onnu og børnum teirra, Vár og Atlas. Ólavur er sjálvstøðugur vinnurekandi, fótbóltsvenjari og býráðslimur. Hann hevur eina jaliga tilgongd til næstan alt og sær altíð møguleikar fram um vansar. Eisini trívist hann sera væl við nógvum bóltum í luftini samstundis og fær kreativ hugskot umsett til veruleika. Frítíðin fer við familjuni, fótbólti, og so hevur hann ein serligan tokka til mat- og vínheimin.

Artur Johansen

Artur er føddur á Strondum í 1970, har hann framvegis býr. Er giftur við Marjun Mikkelsen av Skála, og tey eiga 3 børn. Artur fekk útbúgving sum skrivstovumaður og fór síðani í læru sum grannskoðari hjá Spekt. Í 2009 bleiv hann valdur til borgarstjóra í Sjóvar kommunu, har hann sat í 16 ár. Ítrótturin fylti nógv í ungdómsárunum, og eisini seinni sum venjari. Serliga var tað Stíf og hondbólturin, men eisini fótbólturin við Skála og kappróðurin við Stráluni fóru við tíðini. Hann fylgir framvegis væl við ítróttinum, og er sera upptikin av seyðahaldi og føroysku náttúruni, ið gevur frið í sálina og skapar javnvág og nøgdsemi í gerandisdegnum.

Valevni

Birna Heinesen

Birna er 39 ár, gift við Hans Jákupi og tey eiga synirnar Marius, Sjúrð og Djóna. Hon undirvísir á miðnámi og á Dramaverkstaðnum í Havn. Hon brúkar stóran part av frítíðini til fimleik; sum íðkari, nevndarlimur og venjari, og er eisini virkin í Barnabata. Birna brennur fyri norðurlendskum samstarvi, sum hon hevur drúgvar royndir við, bæði innan list, mentan, skúla og í fakfelagsarbeiði. Tá hon hevur stundir at vera heima, veltir hon egið grønmeti úti í garðinum, lesur og bindur.

Sjúrður Skaale

Sjúrður er 59 ára gamal, giftur við Súsonnu, og tey eiga synirnar Ragnar og Brand. Sjúrður varð púra óvæntað valdur á Fólkating í 2011, har hann hevur verið síðani. Hann hevur stóran alsk til føroysku náttúruna, og dámar væl at ganga í fjøllunum. Tað gevur honum mentala hvíld og løðir battaríini. Hugskotini til tað undirhald, hann eisini fæst við, koma ofta á slíkum túrum.

Sólfríð Bech Hammerfoss

Sólfríð er 35 ára gomul, gift við Jens Arna. Tey eiga børnini Óðin, Brynju og Eira. Sólfríð starvast hjá Strandferðsluni á Tvøroyri. Í frítíðini spælir hon trombone við Tvøroyrar Hornorkestri, og eru tónleikur og mentan eitt stór áhugamál. Eisini dámar henni væl at ganga túrar í føroysku náttúruperlunum saman við familjuni og at ferðast í Føroyum um sumrarnar. Hon finnur hvíld í at renna sær ein góðan túr kring Trongisvágsfjørð.

Stuðul til verkætlanir

Vit hava farna valskeið gjørt nakrar avtalur um stuðul til verkætlanir innan mentan, list, náttúru og siðaarv. Allar avtalur eru gjørdar eftir ynski úr Føroyum og við stuðli frá avvarðandi føroyskum myndugleikum.

Hesi hava fingið stuðul:

Føroya Sjósavn í Havn

Handilshúsini hjá Thomsen á Tvøroyri



Føroysk filmsframleiðsla

Føroysk náttúrugransking og skráseting

Ítróttarháskúlin í Vági

Føroya Fólkaháskúli í Havn

Felagshúsið Messan í Sørvági

Høllin hjá Vága Ríðingafelag í Miðvági

Hósvíkar Róðrarfelag

Róðrarfelagið Knørrur

Føroya Symfoniorkestur

Nógv og fjølbroytt mál

Rættarøkið
Fongsul. Skjótibreyt. KT-skipan. Fleiri ákærar. Vit hava slóðað fyri sera stórum íløgum á rættarøkinum.

Betri treytir til fangar í Danmark
Vit hava tryggjað føroyskum fangum í Danmark munandi betri kor.

Útlendingamál
Vit gjørdu stóra frágreiðing um útlendingaøkið við greiðum tilmælum, harav fleiri blivu fylgd. Vit yvirtalaðu eisini danskar flokkar til at geva lóglýdnum føroyskum borgarum ríkisborgararætt við undantaki.

Nunnurnar rýmdu av órøttum
Tað var ein sorgardagur, tá fyrst katólski presturin og síðani nunnurnar rýmdu úr Føroyum. Vit funnu útav, at presturin var skeivt viðfarin. Danska stjórnin bað um umbering, viðurkendi og rættaði feilin. Ov seint fyri tey, sum fóru, men ikki fyri tey, sum kanska koma.

Greið krøv um Watson
Tá Paul Watson varð handtikin í Nuuk, varð stórt trýst á donsku stjórnina fyri at leyslata hann. Vit talaðu greitt ímóti hesum á øllum pallum. Tí bleiv hann ikki leyslatin fyrr enn eftir drúgvar juridiskar kanningar.

Lættari at søkja um skattafrítøku av pensjónsútgjaldi
Nógvir føroyingar fingu av órøttum skattarokningar úr Danmark. Í samráð við TAKS og SKAT í Danmark fingu vit loyst tað fyri mong.

Føroyskt er javnsett við danskt í filmsgrunninum
Vit hava syrgt fyri, at filmsverkætlanir, sum eru á føroyskum ella fara fram í Føroyum, kunnu søkja stuðul úr Danska Filmstovninum.

Møguleikar til Mest
Tá Danmarks Tekniske Universitet beyð út nýtt havrannsóknarskip, varð Mest hildið uttanfyri. Sama hendi, tá avtala varð gjørd um bygging og viðlíkahald av donskum herskipum. Vit syrgdu í báðum førum fyri, at Mest slapp upp í part.

Vit skulu kunnast um hernaðarmál
Tað var brot á reglurnar, tá eitt amerikanskt hernaðarflogfar fleyg lágt yvir Føroyum uttan, at føroyskir myndugleikar vistu av tí. Vit tóku tað upp og fingu lyfti um, at tað ikki hendir aftur.

Sleppa undan donskum fløskupanti
Danskur pantur er á fløskum og blikkum úr Danmark. Fyri at fáa hann aftur, mugu vørurnar siglast aftur til Danmarkar. Vit stuðlaðu landsstýrinum í at loysa málið, so vit framyvir sleppa undan danska pantinum.

Skrivligir spurningar
So nógvar spurningar hava føroysku flokkarnir sett donsku stjórnini farna valskeið:
- Javnaðarflokkurin: 79
- Sambandsflokkurin: 32



Greið, kontant og virðilig umboðan

Vit hava umboðað Føroyar á kontantan, men virðiligan hátt.

Hetta hevur skapt virðing – og tað hevur slóðað fyri samstarvi og úrslitum.

The New York Times

INTERNATIONAL EDITION | TUESDAY, FEBRUARY 18, 2020

Islands of increasing interest

Í The New York Times

Um ríkisfelagsskapin í “Debatten” á DR 2

Í sendingini “Bezzerwisserne” hjá TV 2

Hjemme er han kendt for at være hylesjov. Her er han blevet den, vi alle taler om

PIERRE COLLIGNON

Gør vi det umuligt for Israel at vinde krigen?

Israel er Salman Rushdie blandt stater

POLITIK

Han gik på som en af de allersidste. Hans tale gjorde Folketinget usædvanligt stille: »Måske årtiets tale«

Det færøske folketingsmedlem Sjúrður Skaale stemplede ind i debatten om Mellemøsten med en tale til Folketingets afslutningsdebat, som nu storroses.

Israels ven i Rigsfællesskabet

KIJKEN. Sociaal-democraat uit de Faeröer eilanden houdt zinnigste betoog over de Gaza-oorlog sinds het begin van de Gaza-oorlog

Forventningen var latter og smil. Kort efter holdt Sjúrður Skaale årets stærkeste tale

Ein partur av umrøðuni í útlendskum miðlum í sambandi við "ársins røðu" 2024

etik eksistens

Kristeligt Dagblad

søndag

e-avis

udkommer kun digitalt

"Når man har lagt dagen i Guds hænder, som vi siger på Færøerne, så tror jeg, ikke, man går man ud og dolker en eller anden i ryggen."

Liv & Sjæl

Derfor undgår vi julen

Á forsíðuni hjá Kristeligt Dagblad

Í størstu belgisku sjónvarpsásini

Javnaðarflokkurin hevur á Fólkatingi umboðað Føroyar á virðiligan hátt, samstarvað við allar viðkomandi partar og fingið nógv og góð úrslit.

Vinna vit sessin aftur, heldur arbeiðið fram.

Tú veitst, hvørjum vit standa fyri.

TÚ VEITST, HVAT TÚ FÆRT.